## Jógvan gevst

Fyrst ætlaði hann sær at halda fram sum formaður í Maskin meistarafelagnum, men nú hevur Jógvan Nybo boðað frá, at hann stillar ikki uppaftur, tá felagið fer at hava aðalfund leygardagin. Avgerðin kom skrivliga seinasta fríggjadag, men sambært Útvarpinum vil Jógvan Nybo ikki siga, hví hann hevur broytt støðu. Limirnir í Maskinmeistarafelagnum hava kortini nóg mikið at velja í, tí tríggir limir hava boðað frá, at teir stilla upp.

## Konsertferð

Tórshavnar Klavertrio er í hesum døgum á konsertferð við tónleiki, sum hevur tilknýti til Ungverjaland. Fyrsta konsertin var á Toftum seinasta fríggjakvøld, og mikukvøldið 21. mars kl. 19.30 spælir trioin í Sandavágs kirkju. Seinasta konsertin verður í Lærarskúlahøllini hóskvøldið kl. 19.30. Í trioini eru Jóhannes Andreasen, klaver, Sámal Petersen á fíól og Tóri Restorff Jacobsen á sello. Skráin umfatar Haydn, Kodaly og Brahms.

# Halda fram at hjálpa sigoynum

**Reyði Krossur arbeiðir í nógvum ymiskum londum, og hevur m. a. luttikið í einum arbeiði millum sigoynar í Serbia.**

**Ætlanin er at halda fram við hesum arbeiðinum fram til 2008**

HJÁLPARARBEIÐI

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Sigoynarnir í serbiska býnum Smederevo fingu forkunnuga vitjan úr Føroyum á heysti 2005. Reyði Krossur og Formula.fo eru við í eini verkætlan at geva hesum børnunum eina bjarta framtíð*

*Mynd: Snorri Brend*

**Havn:** - Hetta er eitt ógvuliga spennandi tiltak, sum vit her eru farin inn í, sigur Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi.

Eitt av endamálunum hjá felagsskapinum er júst at tryggja virðingina fyri menniskjum og at fremja sínámillum semju, vinalag, samstarv og varandi frið millum øll fólkasløg.

Fyri at røkka hesum endamáli hevur Reyði Krossur tikið lut í ymiskum verkætlanum, millum annað hesari í serbiska býnum Smederevo.

Tiltakið her miðar eftir at veita trygd fyri rakstrinum av einum barnagarði til sigoynara-børn, sum annars høvdu havt trupult við at sloppið inn í teir vanligu skúlarnar.

Henda ætlanin er ein av 12 líknandi ætlanum í Serbia, har danska deildin stuðlar teimum 11 og tann føroyska hesi ætlanini í Smederevo.

Tað eydnaðist haraftrat at fáa Formula.fo at verða stuðul í hesi ætlanini, og á heysti 2005 vóru umboð fyri fyritøkuna og Reyða Kross á vitjan í Serbia.

Henda avtalan var galdandi fram til 2006, men er nú ein nýggj avtala gjørt um at halda fram við hesi ætlanini í tvey ár aftrat.

### Heimleys

Reyði Krossur arbeiðir tó ikki bert úti í heimi, men eisini her á landi – millum annað millum tey heimleysu og misnýtarar.

Hetta tiltakið hevur verið umrøtt í miðlunum, og lat tað upp í 2006.

- Brúkararnir hava tikið væl undir við tí. Vit hava síðani tá havt eina miðalvitjan uppá 6,5 fólk um dagin, sigur Suni Vinther.

Tað treyt ikki við sjálvboðnari hjálp at fáa tiltakið í gongd, og hevur almenningurin hevur sum heild róst hesum tiltakinum.

Suni Vinther sigur, at tey hava fingið nakað av peningaligum stuðli, men ikki nærtil nóg mikið.

Fyri at tiltakið kann ganga, eru um 10 sjálvboðin við í tiltakinum.

### Fangar savnaðu inn

Eitt annað arbeiði er tað, sum gjørt hevur verið í arrestini í Havn við jólapakkum.

Hetta málið kom fram í 2004, tá umrøtt varð ætlanin at skipa fyri jólapakkum til teirra, ið komu at sita í varðhaldinum um jólini.

- Hetta tiltakið hava vit so farnu jól havt triðju ferð, og var væl tikið undir við tiltakinum, sum varð fagnað, bæði av teimum innsettu og starvsfólkunum, sigur Suni Vinther.

Fyrsta árið vórðu átta jólapakkar lætnir og í 2005 12 pakkar, meðan talið á jólum í fjør var 10.

Hinvegin so rakti tsunamivanlukkan í Fjareystri eisini inn í fongsulsklivarnar í Jónas Broncksgøtu.

Her tóku teir átta innsettu sjálvir stig til eina innanhýsis innsavning. Upphæddin svaraði til at hvør teirra gav 100 kr. í miðal.

Sig so tað!

> *Tsunami-vanlukkan í Fjareystri rakti eisini inn í fongsulsklivarnar í Jónas Broncksgøtu. Her tóku teir átta innsettu sjálvir stig til eina innanhýsis innsavning. Upphæddin svaraði til at hvør teirra gav 100 kr. í miðal*

## Formaðurin afturvaldur

Reyði Krossur Føroya hevði aðalfund sunnudagin, har millum annað nevndarval var á skránni.

Nýggja nevndin skipaði seg beint eftir aðalfundin og er henda: Súni Vinther, formaður, Anna Dahl-Olsen, næstformaður og skrivari, Líggjas Joensen, kassameistari, Atli Godtfred, nevndarlimur, Kaja Nielsen, nevndarlimur. Varalimir eru: Per N. Persson og Mads W. Lützen

# Føroyskur filmur við á altjóða filmsfestivali í Íslandi

FILMUR

*Tíðindaskriv*

Super8-filmurin hjá Mariannu Mørkøre og Mariu Arnell, sum bleiv tikin upp í samband við fotomyndaroðina "Fragmented Unison", er úttikin til altjóða filmsfestivalin 700IS, sum verður hildin á Egilsstøðum, 24.-31.mars. 700IS er ein festivalur fyri eksperimentella films- og videolist, og er tann einasti av sínum slag í Íslandi.

Fragmented Unison-filmurin er ein stummfilmur á góðar 2 min. Eins og fotomyndirnar hevur filmurin ein surrealistiskan dám við íblástri úr sterkum grafiskum kompositiónum, har tann klassiska føroyska náttúrumyndin er sett saman við fimm einsháttaðum gentum.

Hetta er triðju ferð, at festivalurin verður hildin, og hevur hann fingið vaksandi áhuga hjá filmslistafólkum úti í heimi. Hesa ferð vóru 500 filmar latnir inn til festivalin, har Fragmented Unison er millum teir 90 útvaldu filmarnar. Tá festivalurin er komin at enda, velja úttøkunevndin og áskoðararnir teir bestu filmarnar, sum skulu umboða filmsfestivalin í øðrum londum.

Til ber at síggja Fragmented Unison-fotomyndirnar á www.marmar.nu/photography og meira um filmsfestivalin á www.700.is

# Sands kommuna er sjeynda kommunan í KSF

**Á aðalfundi hjá Kommunusamskipan Føroya fríggjadagin varð limaskapurin hjá Sands kommunu endaliga staðfestur**

KOMMUNUR

*Tíðindaskriv*



Sands kommuna er harvið sjeynda limakommunan í KSF, sum nú umboðar 68,9% av borgarunum í Føroyum. Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi, hevur sæti í stýrinum fyri KSF saman við borgarstjórunum í hinum limakommununum.

Á aðalfundinum legði Heðin Mortensen, stýrisformaður, fram frágreiðing um virki felagsins í farna ári og um framtíðarætlanir. Frágreiðingin er almenn á heimasíðuni hjá KSF.

Gestarøðari á aðalfundinum var Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum legði Visjón 2015 fram við serligum atliti at kommunalum viðurskiftum. Løgmaður fegnaðist m. a. um tað stóra íkast, ið KSF hevur givið til Visjón 2015-arbeiðið.